Føroya Tele leitar úteftir

Fyribils miðar føroyska telefyritøkan eftir at selja ráðgeving og nakrar ávísar tænastur uttanlands

Føroya Tele kannar nú møguleikarnar fyri øktum útflutningi av tænastum. Hetta er grundin til, at føroyska telefyritøkan fyri fyrstu ferð hevur egnan bás á heimsins størstu teleráðtevnu og -messu Telecom World 2003. ITU, sum er altjóða ST-felagsskapurin fyri tele, skipar fyri ráðstevnuni, ið verður í Geneve í døgunum 11. - 18. oktober. Telecom World er so stórt tiltak, at tað bert verður hildið 4.hvørt ár, og tað hevur tí fingið kelinavnið 'Olympisku Leikirnir' hjá televinnuni.

- Tað besta, vit á handilsligari grund kunnu gera fyri at skapa pláss fyri meira enn einari telefyritøku í Føroyum, er at víðka samlaða marknaðin, bæði landafrøðiliga og við nýggjum virkisøkjum, sigur Tróndur Djurhuus, menningarstjóri hjá Føroya Tele. Luttøka okkara á Telecom World 2003 er ein liður í arbeiðinum fyri hesum, sigur hann.

Føroya Tele fer í fyrstu syftu undir búmerkjunum FT Consult og Faroese Telecom International at bjóða tænastur, sum hava tilknýti til og byggja á føroysku menningina av einum digitalum sjónvarpssendineti. Føroyska netið, sum verður fyrisitið av dóttirfelagnum Televarpinum, var tað fjórða av sínum slagi í øllum heiminum, tá tað varð tikið í nýtslu. Føroya Tele hevur seinastu mánaðirnar fingið nógvar umbønir um ráðgeving og stuðul frá útlendskum teleføloum, serliga í smærri londum. Eisini hava ávísir útlendskir veitarar av ávikavist tøkni og ráðgeving biðið um formligt samstarv við Føroya Tele.

Varpa ljós á føroyskt KT

Føroya Tele hevur í samstarvi við føroysku KT-fyritøkuna Kervi ment eina fyrisitingarliga skipan til Televarpið, sum er so framkomin og sjálvvirkandi, at tá nýggir haldarar fyrst eru skrásettir, krevst eingin arbeiðsmegi yvirhøvur til at arbeiða við innkrevjing ella sløkking og tendring av signalinum heima hjá haldaranum. Hetta hevur vakt stóran ans uttanlands, har avrokningin mangan kostar nógv og voldar stórar trupulleikar. Føroya Tele eigur rættindini til hesa skipanina, og umframt at selja ráðgeving ber eisini til at selja hana til áhugaðar útlendingar.

Føroya Tele og Kervi hava harafturat ment nakrar virðisøktar tænastur, sum byggja á felags nýtslu av interneti, fartelefoni og digitalum sjónvarpi. Hesar tænastur, sum verða róptar Crossmedia-tænastur, verða eisini vístar fram í Geneve.

- Hetta ber tað positiva í sær, at vit kunnu gera vart við tann kreativa føroyska KT-ídnaðin, samstundis sum vit selja ráðgeving og tænastur, sigur Tróndur Djurhuus. Hetta er beinleiðis í samsvari við strategiina hjá okkum, har vit áleggja okkum sjálvum ikki bert at menna Føroya Tele, men eisini umhvørvið kring okkum.

Av somu orsøk er Føroya Tele eisini ein av høvuðssponsorunum í átakinum Bitlandi, og telefyritøkan hevur boðið Bitlandi at verða við á básinum í Geneve, so ikki bert KT- og teletænastur, men eisini allar Føroyar verða marknaðarfordar sum testmiðstað fyri útlendskar tøkniveitarar.

Til ber at leita sær fleiri upplýsingar á heimasíðunum faroesetele.com, thebitland.com og itu.org umframt við at venda sær til Trónd Djurhuus, menningarstjóra hjá Føroya Tele, á tlf. 303130 (beinl.) ella um teldubræv-adressuna tdj@ft.fo.

Ferðslutiltak fyri børn á Kambsdali

Kiwanis í Havn hevur givið børnunum í Gøtu kommunu 90 vestar við endurskini og eina farteldu, sum skal nýtast í menningini av børnum við breki

FERÐSLUTILTAK

Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Hósdagin, 2. oktober, varð skipað fyri ferðslutiltaki í Ítróttarhøllini á Kambsdali. Tað var Ráðið fyri Ferðslutrygd, Dagstovnurin og dagrøktin í Gøtu kommunu, sum skipaðu fyri tiltakinum, ið vardi frá kl. 17.30-19.30 hendan dagin.

- Tíðliga í summar fingu børnini í Gøtu eina stórfingna gávu frá Kiwanis í Havn. Vit fingu 90 vestar við endurskyni og eina farteldu, sum serliga verður brúkt í menninigini av børnum við breki. Tað var fyri at »markera« hesa stórfingnu gávu og at kunna børnini um endurskyn, at vit tóku stig til hetta tiltak.

Soleiðis greiðir Torgerð Hansen, leiðari á Dagstovninum í Gøtu frá.



- Teldan er ógvuliga hent sum partur av menningini hjá børnum við breki, sigur leiðarin á Dagstovninum í Gøtu, Torgerð Hansen. Aftanfyri sæst bilurin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd.
Mynd: Bárður Lydersen

Størri tryggleiki

Í Dagstovninum við Gøtugjógv eru 76 pláss og í dagrøktarskipanini eru 15.

Tað er dagstovnurin, ið tekur sær av at ansa vestunum og býta teir út, tá ið teir skulu nýtast.

- Tá ið kvinnurnar, sum hava børn í dagrøkt, fara út at ganga við børnunum, koma tær her eftir vestunum.

Torgerð sigur, at vestarnir við endurskini verða brúktir, tá ið farið verður fram við landsvegunum við børnunum.

- Tað gevur ein nógv størri tryggleika, at børnini eru í vestum, tá ið ferðast verður eftir vegunum. Børn eru »spontan«; tey kunnu finna uppá alt møguligt. Síggja tey ein stein ella eitt hvørt annað úti á vegnum, kunnu tey leypa avstað. Tú ert ongantið tryggur fram við landsvegnum uttan so, at tú hevur eitt barn í hvørjari hondini. Børn eru nú einaferð soleiðis, sigur hon.

Væleydnað tiltak

Torgerð sigur, at nógv børn, foreldur og arbeiðsfólk á stovninum og í dagrøktini annars vóru við til tiltakið í Ítróttarhøllini á Kambsdali.

- Eg haldi, at tiltakið eydnaðist sera væl. Tað var serliga Hugo Kristiansen, koyrilærari, sum tók sær av undirvísingini, og Jón Kragesteen, dagligur leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, var eisini við og stuðlaði.

RFF hevði bilin, sum stovnurin eigur, við í Ítróttarhøllini hendan dagin.

- Ljósini vóru sløkt í høllini, og í vestunum í myrkrinum sóu børnini, hvussu stóran týdning tað hevur at nýta endurskin.

Torgerð sigur, at kunnað varð eisini um, hvønn týdning tað hevur, at børnini ganga í ljósum klæðum í myrkri heldur enn myrkum klæðum.

- Jú, eg haldi, at bæði børn og vaksin lærdu nógv hendan dagin, og vit fingu tað burtur úr, sum vit ætlaðu, sigur hon.

Nógv ferðsla

Leiðarin á Dagstovninum sigur, at rættiliga nógv og tung ferðsla fer eftir landsvegnum við Gøtugjógv.

- Bilarnir koyra skjótt og vit, sum skulu tvørtur um landsvegin við børnum, stúra mangan fyri hesum.

Hon sigur, hóast bøtt er um møguleikarnar at fara tvørtur um landsvegin við Gøtugjógv, er ikki líkt til, at bilførarar vísa nakað serligt fyrilit á økinum.

- Eg haldi ikki, at ferðin er minkað, hóast yvirgongdin er gjørd týðiligari við frámerkingum og ljósum.

Torgerð sigur, at tungir bilar, sum skulu niðan brekkuna á Gøtueið, líkasum fáa sær ferð niðri á slættanum, og tá kann ferðin stundum gerast rættiliga nógv.

- Áður var løgreglan javnan her á leiðini og gjørdi ferðkanningar, men í longri tið hava vit ikki sæð teir her á landsvegnum.

Men, sum hon tekur til:

- Teir hava eisini onnur vegastrekki at taka sær av.

Góð telda

Torgerð sigur, at tey eru ógvuliga fegin um telduna, tey hava fingið.

- Hetta er eitt óført amboð, sum er hent í menningini av børnum við breki. Talupedagogar eru her einaferð um vikuna, og síðan kunnu børnini mennast við ymiskum telduspølum og øðrum venjingum.

Leiðarin leggur tó dent á, at tað nú heldur ikki er soleiðis, at børnini sita við telduna allan dagin.

- Jú, teldan er ógvuliga hent, tá ið hon verður nýtt sum partur av menningini hjá børnunum. Hon verður ætlandi útbygd uppaftur meira og verður tiskil til uppaftur størri nyttu, sum tíðin líður, sigur Torgerð Hansen.

76 børn eru á Dagstovninum við Gøtugjógv og 15 eru í dagrøkt í kommununi. Herfyri var stórt ferðslutiltak í Ítróttarhøllini á Kambsdali, har børn, foreldur og starvsfólk vóru kunnaði um týdningin av at nýta endurskin.
Mynd: Bárður Lydersen

Her eru børnini í vestum við endurskini, sum Kiwanis í Havn hevur givið børnum í Gøtu kommunu.
Mynd: Bárður Lydersen

Umsíðir vóru arbeiðspláss skapt í USA

MARKNAÐARRÁK

Sera stór skift fóru fram á bæði lánsbræva- og partabrævamarknaðunum í farnu viku. Vikan byrjaði við vánaligum tølum, sum vísti, at álitið hjá amerikumanninum um búskaparligu støðuna fall í september. Hetta førdi við sær, at lánsbrævarentur og partabrøv sum heild lækkaðu. Vikan varð kortini merkt av, at sera týdningmikla frágreiðingin um støðuna í amerikanska arbeiðsmarknaðinum varð kunngjørd fríggjadagin 3. oktobur.

Hendan frágreiðingin gjørdist bjartari enn væntað og vísti, at 57.000 arbeiðspláss vóru skapt í september; ein vend í einari heldur daprari gongd, tí líka síðani februar eru arbeiðspláss farin fyri skeyti í USA. Av tí nýtslan hjá meiniga manninum stendur fyri 2/3 BTÚ í USA, er sera týdningarmikið fyri búskaparligu framgongdina, at arbeiðspláss verða skapt. Sum ein avleiðing av bjørtu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini hækkaðu bæði lánsbrævarentur og partabræv munandi farna fríggjadag.

ECB hevði mánaðarliga rentufundin í farnu viku, og júst sum væntað varð evropiska rentan ikki broytt. ECB væntar framvegis, at evropiski búskapurin styrknar restina av árinum og næsta ár. Tískil er lítið sannlíkt, at evropiska og harvið eisini føroyska rentustigið lækkar meira á hesum sinni. Hetta var seinasti fundur hjá ECB við Wim Duisenberg sum leiðara. Í novembur verður hann avloystur av fraklendinginum Jean-Claude Trichet.

Meðan farna vika var merkt av sera týdningarmiklum búskaparligum uppgerðum, verður hendan vikan heldur friðarligari á hesum økinum. Øll eygu vóru í farnu viku vend móti nevndu arbeiðsmarknaðarfrágreiðing og Marknaðarrák metur, at marknaðirnir kunnu verða friðarligir til hósdagin, tá tann vikuliga uppgerðin um sama arbeiðsmarknað verður kunngjørd.

Næstu dagarnir kunnu tó verða merktir av roknskaparkunngerðunum fyri 3. ársfjórðing, sum er um at byrja. Byrjað verður sum vant fyrst í USA, og hesa vikuna kunngerða m.a. Pepsico, Yahoo! og General Electric roknskapir. Sum áður nevnt í Marknaðarráki verður mett, at roknskapirnir kunnu gerast góður eins og fyri tveir teir undanfarnu ársfjórðingarnar. Verður hetta so, og búskaparligu kunngerðirnar samstundis verða bjartar, kann roknast við hækkandi lánsbrævarentum og hækkani partabrævamarknaðum.

Rentur

	Renta	+/- %-stig
Diskonto	2,00%	0,00%
2 ára lánsbræv	2,79%	0,14%
5 ára lánsbræv	3,61%	0,16%
10 ára lánsbræv	4,38%	0,12%

Partabrævavísitøl

	Kursur	+/- %
KFX, Danmark	248,7	2,7%
OMX, Svøríki	592,2	2,9%
DJ Stoxx 50, Evropa	2.493,1	2,6%
S&P 500, USA	1.029,9	2,3%

Íløgufeløg

	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	106,78	-0,3%
Evru Lánsbrøv	164,74	-0,2%
Norrøn Partabrøv	69,27	1,6%
Altjóða Partabrøv	71,59	0,0%

Gjaldoyru

	Kursur	+/- %
USD	641,00	0,1%
EUR	742,89	0,0%
GBP	1.066,12	-0,1%
NOK	90,88	-0,5%

Renta og kursir kl 10 íggjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.